Skrivligur fyrispurningur

§ 52a eftir Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Um boriútgerðina til Tjørnuvíkartunnilin

Spurningur:

1. Hví er boriútgerðin til Tjørnuvíkartunnilin ikki flutt norður enn – og hvar stendur hon nú?
2. Nær kann væntast, at boriútgerðin verður flutt?
3. Nær verður fyrsta skotið latið av til Tjørnuvíkartunnilin?

Viðmerking:

Hendan samgongan hevur í fleiri fíggjarlógum sett játtan av til Landsverk at fyrireika og gera eina nýggja farleið til Tjørnuvíkar. Á borgarafundi í Tjørnuvík á sumri 2024 greiddu Landsverk og landsstýrismaðurin frá, at fyrireikingarnar gingu væl og ætlanin var at byrjað arbeiðið á vetri í 2024. Samgongan hevur verið samd um, at so skjótt toymið hjá Landsverki var liðugt at bora Dalstunnilin, skuldi útgerðin flytast norðureftir, so farast kundi undir at bora til Tjørnuvíkar uttan drál.

Seinasta skotið í Dalstunlinum var latið av fyri júst tveimum árum síðani og arbeiðsfólkið í boritoyminum var liðugt við tunnilsarbeiðið fyrr í ár. Men enn er eingin útgerð at síggja hvørki í Tjørnuvík ella í Haldórsvík.

Tí setur undirritaði landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum hesar spurningar.

Á Løgtingi, 18. desember 2025

Henrik Old